

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 12 - 2012

# Havnin skjótt vindmylnulund til granna

Í gjár vórðu tilboðini upp á 11,7 MW vindorku latin upp, sum Jarðfeingi fyrr í ár bjóðaði út. Inn komu tvey tilboð og hevði SEV lægsta tilboðið. Hitt tilboðið var frá PF Røkt. Tilboðið hjá SEV umfatar uppseting av 13 vindmyllum av slagnum ENERCON E44-900 kW uppi í Húsahaga norðanvert Tórshavn. Umframt góðu vindviðurskiftini í Húsahaga er hendan staðsetingin vald grundað á góðu atkomumøguleikarnar og góðu møguleikarnar at knýta í elkervið. Hendan verkætlan sparir SEV fyri góð 9.000 tons av olju um árið og svarar hetta til umleið 40 mió. kr. í spardum oljuútreiðslum. Umroknað til elnýtslu til eini vanlig sethús fara vindmyllurnar at veita elorku til umleið 7.500 sethús skrivar heimasíðan hjá SEV. Orkufelagið Magn er partur av verkætlanini hjá SEV. Nú skal Jarðfeingi so kanna bæði tilboðini, áðrenn endalig avgerð verður tikin tíðliga í 2013. Fyri nøkrum vikum síðani tók SEV eitt ódnartak fram móti at gera føroyska samfelagið meira grønt. Tá tók felagið í nýtslu fimm stórar vindmyllur í Neshaga í Eysturoynni, sum nú koyra við fullari ferð alt samdøgrið og framleiða tað, sum svarar til árligu elnýtsluna hjá 3.500 húsarhaldum. Vindorkustrategiin hjá SEV er í tráð við ynskið hjá politisku myndugleikunum um, at størri partur at føroysku orkunýtsluni skal koma frá varandi orkukeldum, og har er vindorkan ein týðandi partur. Myndirnar vísa ætlaðu staðsetingina av vindmyllunum og hvussu hesar taka seg út í landslagnum. Kelda www.sev.fo Vindmyllurnar í Neshaga og seinni í Húsahaga fara at vera týðandi varar í framtíðar orkusøgu Føroya. Mynd oljan.fo/Jan Müller